# Obama hartar eftirlitið

Amerikonsku myndugleikarnir høvdu nóg góðan kunnleika og upplýsingar til at forða nigeriska manninum umborð á eitt flogfar við spreingievni jóladag, men kortini sveik eftirlitið. Tað segði Barack Obama, forseti, á tíðindafundi í gjárkvøldið, eftir at hann hevði havt fund við sínar trygdarráðgevar. Hann segði, at málið avdúkar ein sera álvarssaman veikleika í amerikonsku skipanini, og at nú skal kannast, hvussu hetta kundi henda. Forsetin legði afturat, at hann hevur kravt, at neyðugir batar verða settir í verk alt fyri eitt, so slíkt má og skal ikki henda aftur, segði hann.




# Iran bannar sambandi

Í Iran hava myndugleikarnir bannað landsins íbúgvum at hava nakað samband við 60 stovnar og felagsskapir. Millum teirra, sum eru komin á svartalista, eru bretska kringvarpið BBC, útvarpsstøðin Voice of America, mannar ættindafelagsskapurin Human Rights Watch og iranska andstøðuheimasíðan Rahesabz. Ein talsmaður fyri myndugleikarnar sigur, at teir bannaðu stovnarnir og felagsskapirnir hava havt tilknýti til royndir hjá londum í Vesturheiminum at fella ta iransku stjórnina. Samstundis mæla myndugleikarnir fólki frá at hava nakað samband við útlendskar sendistovur.

# Nú bróta vit upp um armar

**Nú fyrsta vónbrotið av dóminum í málinum hjá Tony Paris móti KÍ hevur lagt seg, og nevndin í felagnum hevur havt fund, er bjartskygni við at vinna fótafestið aftur í Klaksvík**

DÓMSAVGERÐ
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Eftir at fyrsta stóra vónbrotið hevur lagt seg, hyggja Tummas Lervig og restin av nevndini í KÍ fram eftir*
*Mynd: Norðlýsið*

Tað var ein sera vónbrotin formaður fyri KÍ, sum í gjár eftir dómin í Føroya Rætti í sakarmálinum hjá Tony Paris móti Klaksvíkar Ítróttafelag úttalaði seg til miðlarnar. Men nú avgerðin er samdøgur gomul hevur vónbrotið lagt seg, og formaður og nevnd hava nú valt at hyggja fram eftir.

- Vit viðgjørdu dómin á fundi í gjár og settu okkum beturinni í grundgevingarnar. Tað er nakað liðið síðani dómurin fall, og vit kundu viðgera málið í einum eitt sindur øðrvísi ljósi, sigur Tummas Lervig, formaður í KÍ.

Serliga var tað upphæddin, sum KÍ er dømt at rinda, sum fekk umrøðu. Gingið vart tó ikki í smálutir, og felagið hevði valt ikki at hava sakførara sín, Jógvan Elias Winther Poulsen við á fundinum.

- Nei, tað var bara nevndin, sum var á fundi, og í stuttum stungu vit út í kortið hvat tað er, ið vit nú fara at gera, sigur Tummas Lervig.

Og tað, sum nú liggur í kortunum er at tosa við baklandið hjá felagnum.

- Tað er serliga teir partar, sum vóru við í hesum málinum frá byrjan av, og tað fara vit so at taka við í tann juridiska partin. Finna út av, hvat er rættast hjá okkum at gera, sigur Tummas Lervig.

## Sigur fyri KÍ

Sum nevnt var formaðurin sera vónbrotin av peningaupphæddini, sum felagið skal rinda í endurgjaldskravi, men nú hevur dómurin so fingið tíð at sorna.

- Ja, eg var sera vónbrotin í gjár út frá tí, at eg hevði roknað við, at felagið heilt varð frífunnið. Men venda vit tí hinvegin so kunnu vit siga, at vit í veruleikanum hava vunnið málið, tí dómurin endaði við einari upphædd, sum er væl niðanfyri helvtina av kravinum hjá Tony Paris, sigur Tummas Lervig.

Hann viðgongur tó, at tað framvegis eru nógvir pengar, sum felagið skal útvega.

Hinvegin heldur hann ikki, at »worst case scenario«, nevniliga at felagið pakkar saman og síðani byrjar aftur í fimtu deild, er aktuelt í dag.

- Fyrsta reaktiónin var tað, sum var rætt í gjár, men veruleikin er, at KÍ er so ómetaliga stórt, bæði innan vaksnu og yngru deildirnar, og bæði innan fótbólt og hondbólt. Felagið er so ómetaliga nógv, og tað er tað, vit mugu taka støðu út frá, sigur Tummas Lervig.

KÍ er Klaksvík, og tað eru mong í Klaksvík, sum identifisera seg við KÍ, eins og KÍ identifiserar seg við Klaksvík, og nú verður so hugt frameftir.

- Vit fara at seta okkum í samband við okkara bakland, líka gjarna í dag sum í morgin, og so taka vit tað harfrá, sigur Tummas Lervig, formaður í KÍ.

# Dimmueigarar seta ikki meira í felagið

**Tvær av høvuðspartareigarunum í Dimmalætting, Lisbeth L. Petersen og Beate L. Samuelsen, staðfesta, at tað ikki verða tær, sum seta meiri pening í P/F Dimmalætting**

DIMMALÆTTING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Beate L. Samuelsen*



*Lisbeth L. Petersen*

Lisbeth L. Petersen og Beate L. Samuelsen, sum eru millum høvuðspartaeigararnar á Dimmalætting, staðfesta, at tað ikki vera tær, sum fara at seta pening í Dimmalætting fyri at fáa skuldina niður.

Hetta siga tær í kjalarvørrinum av, at tað í fyrradagin kom fram, at stórar umleggingar eru ávegis á Dimmalætting.

Lisbeth L. Petersen staðfestir - júst sum stjórin, Árni Gregersen, gjørdi í Sosialinum í gjár - at ein umskipan er ávegis, men at hon ikki vil upplýsa, hvønn samráðst verður við.

- Vit samráðast ymsar vegir, og tí kann eg ikki siga nakað um, hvønn vit samráðast við, sigur Lisbeth L. Petersen.

Hon leggur eisini afturat, at enn eru ognir í felagnum, sum tað ber til at selja.

Tað hevur ljóðað at starvsfólk á Dimmalætting skuldu taka seg saman og gera okkurt, men hetta kenna, hvørki Beate L. Samuelsen, sum er millum størstu partaeigararnar og arbeiðir á blaðnum, ella stjórin, Árni Gregersen, nakað til.

- Eg rokni við, at eg hevði vitað tað, um nakað var, sigur Beate L. Samuelsen.

Afturat hesum vilja tær báðar ikki upplýsa alt ov nógv, men tær staðfesta, at tað er skuldin í felagnum, sum gevur stórar avbjóðingar og at tað hevur verið arbeitt við eini loysn í longri tíð.

Stjórin í Notio, sum er íleggingarfelag, ið eigur nógv í Dimmalætting, sigur seg ikki kunna gera viðmerkingar til nakað um Dimmalætting.

Seinastu árini hevur Dimmalætting havt stórt hall, og í dag liggur skuldin hjá felagnum á umleið 25 milliónum krónum.